# Umsitingarfólk til maskinverkstað

Fyri eina fyritøku í Streymoynni søkja vit eftir dugnaligum fólki at taka sær av at samskipa fyrisitingarligu uppgávurnar á maskinverkstaðnum. Maskinverkstaðið bjóðar fram tænastur innan umvælingar av maskinum og motorum, umframt smiðjuarbeiði. Á verkstaðnum starvast 8 fólk, men virkið hevur eisini annað virksemi, so tilsamans eru 35 fólk í virkinum.

**Arbeiðsuppgávur:**

Starvið er fjølbroytt og sjálvstøðugt. Viðkomandi kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við verandi verkstaðsleiðara, og skal virka fyri at arbeiðsuppgávur og avtalur verða samskipaðar - eisini fyrisitingarliga. Starvið inniber í høvuðsheitum hesar uppgávur:

- at menna sølu- og tænastuavtalur og veita verandi kundum eina góða tænastu.
- at hava eitt gott og positivt samskifti við kundar, sum venda sær til fyritøkuna.
- at útvega eykalutir til verkstaðið.
- at fyrisita arbeiðsseðlar og tímanýtslu, umframt aðrar uppgávur, ið náttúrliga hoyra til umsitingarliga partin av verkstaðsleiðsluni.

**Umsøkjarar:**

Vit søkja eftir einum persóni, ið er positivur og ágrýtin, hevur evni at samstarva við onnur og ikki er bangin fyri nýggjum avbjóðingum.

Vit vænta, at tú í minsta lagið hevur hesar førleikar:

- Tekniskt innlit og kunnleika um motorar helst arbeiðsroyndir
- Kann taka ábyrgd við støði í ásettum heimildum
- Dugir at nýta teldu og ymisk telduforrit
- Dugir at orða teg á enskum og donskum bæði munnliga og skrivliga
- Fer væl um og kann samskipa arbeiðsuppgávur við skili
- Er tænastusinnað/ur

Løn og setanartreytir verða sambært avtalu við arbeiðsgevara.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Virkisráðgeving, Saltangará, telefon 44 95 91 og tosa við Duritu Djurhuus ella Símun Hammer. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknarfreistin er 1. februar 2004.

Hevur hetta starvið tín áhuga, so send eina umsókn til: Virkisráðgeving, Postrúm 26, FO-600 Saltangará og merk brævið "Umsitingarfólk til maskinverkstað"

Virkisráðgeving Spf

Leiðsla - Búskapur - Marknaðarføring - Rekruttering - Góðskuskipanir

Heimasíða: http://www.konsult.fo

# Sjómansskúlalærari

Søkt verður eftir einum lærara sum avloysara fyri lærara í farloyvi frá 1. februar til 1. juli.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu hava skipsføraraútbúgving.

**Arbeiðsuppgávur:**
Tann setti kemur at undirvísa í m.a. enskum, skipstøkni, veðurfrøði og sjóreglum. Nærri fæst at vita um lærugreinir við at venda sær til Klaksvíkar Sjómansskúla.

**Løn:**
Lønin verður eftir sáttmála ímillum Føroya Landsstýri og felagið hjá Navigatións- og maskinskúlalærarum.

**Umsóknarfreist:**
24. januar 2004.

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu sendast til:

**Klaksvíkar Sjómansskúla**
Garðavegur 11
Postsmoga 330
700 Klaksvík

# Bilur til sølu

Reyður Mazda 6, 5 hurðar, 1.8, 122 HK við sportfelgum.

Verður seldur við stórum avslættri.

**Tlf. 583388**



**Ellis- & avlamisheimið í Vágum**

# Avloysari

## Økonomaassistentur/ køksassistentur

Søkt verður eftir avloysara sum økonomaassistentur á 1.0 tíð frá 1. apríl 2004 og árið út.

Dentur verður lagdur á hug og hegni at veita viðskiftafólkunum eina góða tænastu eins og góð samstarvsevnir hava stóran týdning.

Lønt verður eftir sáttmála økonomurnar við Fíggjarmáláráðið.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi v.m. verður at senda til heimið áðrenn 15. februar 2004.

Meira at vita um starvið fæst við at venda sær til heimið persónliga ella at ringja annaðhvørt til økonomuna ella leiðaran, tlf. 332604 ella 332600.

# Goymslumaður/ Húsavørður

Søkt verður eftir røskum manni at arbeiða á Hjalla. Tann, ið settur verður, kemur at hava ábyrgdina av goymsluni inni og eisini á plássinum uttanfyri.

Á innanduragoymsluni eru m.a. smærri amboð, eykalutir, el-lutir. Uttandura eru størri amboð, formar, jarn, v.m.

Goymslumaðurin skal vera røkin, duga at viðlíkahalda smáamboð og arbeiða sjálvstøðugt.

Hevur hetta tín áhuga, vinarliga send eina skrivliga umsókn til

J & K

**P/F J & K Petersen,**
á Hjalla · FO-188 Hoyvík
Tlf. 315060 · Fax 314194
e-mail: jkp@jkp.fo

# Reingerðing

av Felagsskúlanum á Oyrarbakka verður hervið boðin út. Byrjað verður 1. mas 2004.

Felagsskúlin ætlar at gerast grønur skúli, og vaskað verður við tilfari úr mikrotrevjum.

Nærri upplýsingar um treytir o.a. fáast við at venda sær til Felagsskúlan á tlf. 42 20 84.

Møgulig tilboð skulu vera Felagsskúlanum í hendi í seinasta lagi 26. januar 2004 kl. 15.00.

Felagsskúlin skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomin tilboð ella einki at taka.

Oyrarbakki, 14. januar 2004

**Felagsskúlin á Oyrarbakka**
FO-400 Oyrarbakki
Tlf. 42 20 84 · Fax 42 21 57

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar

# Hús í Vági til sølu

Hús í Lágabø til sølu.

Prísur kr. 400.000,-

**Tlf. 37 38 74 ella 22 85 91**





Altjóða Barnalegur CISV skipar fyri
**stuttligari og spennandi summarfrítíð !!!**

Børn og ung hava aftur í summar møguleikan at søkja um luttøku á CISV legum. Legurnar, sum á hvørjum ári, verða hildnar um allan knøttin, byggja allar á sama grundsjónarmið. Børnini koma, at liva saman við børnum úr nógvum øðrum londum, skapa vinarbond og læra um fólk og mentanir í hinum londunum.

Til legurnar í summar sóknast vit eftir børnum og leiðarum.

- **Barnalegur** Hesar legurnar eru fyri 11-ára gomlum børnum, og vara í 4 vikur. Í hvørjum bólki eru 2 gentur, 2 dreingir og ein leiðari.
- **Summarlegur** Tey ungu skulu verða 14 - 15 ár. Tær legurnar vara í 3 vikur. Í hvørjum bólki eru 2 gentur, 2 dreingir og ein leiðari.
- **Interchange** Millum børn úr Suðuroy og ein bý í Finnlandi. Ein bólkur við leiðara og 8 ungum í aldrinum 12-13 ár úr hvørjum landi eru saman í ein mánað. 14 dagar í hvørjum landi.
- **Ungleiðarar** Til nakrar legur hava vit brúk fyri 16 og 17 ára gomlum ungleiðarum.
- **Leiðarar** Leiðarar skulu verða í minsta lagi 21 ár. Hava hug og hegni at fáast við børn og ung og duga væl at samstarva við onnur.

Heldur tú, at hetta er nakað fyri teg og vil frætta meira, ert tú vælkomin at ringja til Tóru Tórgarð tlf 321961 ella 221590, har tú eisini fært umsóknarblað. Freistin at søkja er 1. feb. 2004.

CISV
ALTJÓÐA BARNALEGUR
AN INDEPENDENT, NON-POLITICAL, VOLUNTEER ORGANISATION PROMOTING PEACE EDUCATION AND CROSS CULTURAL FRIENDSHIP



# KOM OG SYNG VIÐ!!

**Leygarkvøldið 17. januar 2004 klokkan 21.00, skipar yngra kvartettin í Betesda Klaksvík fyri evangeliskari sangløtu í**

## ÍTRÓTTARHØLLINI Í KLAKSVÍK

**Á skránni er:** **Felagssangur**
**Kvartettsangur**
**Drama**
**Tala**

**Aftaná verður bjóðað til kaffi**

**ØLL eru hjartaliga vælkomin**

*Smakkið, og síggið, at HARRIN er góður! Sælur er tann maður, ið søkir sær skjól hjá Honum.*

***Sálmur 34,9***

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 18. desember 2003 samtykti broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, at byggisamtyktin verður víðkað, soleiðis at nýggj byggiøkir verða løgd út norðan- og vestan fyri verandi bygging í Hoyvíkshaganum og eitt A3-øki verður lagt út norður/vestur frá ovara Ternuryggi/undir Brúnni.

Broytingin liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá mánadegnum 19. januar til og við mánadegnum 9. februar 2004, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 12. apríl 2004.

SNARSKIVAN

# SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN

**Sjálvstýristilgongdin heldur fram**

Carl August Arge



**Sjálvstýri**

Jón Ellendersen



**Tey eldru**

Terji Rasmussen



**Mentanin**

**hvør kann? .... D kann**